Bygdaráðsfundur

Hvalbiar Kommuna

Dagfesting: 20.08.2026 kl. 16.30

Á fundi:	Poul Laust Christiansen
	Eir J. Norðberg (fyri Janus Thomsen)
	Rakul Mørk
	Thorstein Thomsen (fyri Otto West)
	Jóhannes Liasson Rasmussen
	Jónfinn L. Poulsen
Ikki møtt:	Ronni Hammer
Skrivari:	Johanna B. Djurhuus

1. 102-38-2026: Umsókn um byggiloyvi til útistovu á matr. nr. 142e, Hvalba.

Til viðgerðar umsókn um byggiloyvi til óupphitaða útistovu í Heiðatrøðini 11, Hvalba.

Tekniska nevnd 18.08.2026:

Nevndin viðmælir umsóknini um byggiloyvi.

Avgerð:

Samtykt varð einmælt at fylgja tilmælinum hjá nevndini og byggimálsviðgeranum og geva byggiloyvi sambært umsókn, givnum upplýsingum og tekningum.

2. 102-70-2022: Kostnaðarmeting - innilokan av vatninntaki.

Kostnaðarmetingin av at inniloka vatninntakið á Knænum er umleið kr. 130.000,00. Metingin av at gera sjálvt inntakið var umleið kr. 205.000,00.

Tekniska nevnd 18.08.2026:

Nevndin mælir til, at arbeiðið verður gjørt sambært kostnaðarmetingini.

Fíggjarnevndin 20.08.2026:

Samtykt varð einmælt at mæla til at játta peningin til at inniloka vatninntakið sambært kostnaðarmeting, umframt møguligan meirkostnað við upp til kr. 40.000,00.

Avgerð:

Samtykt varð einmælt at fylgja tilmælinum hjá Fíggjarnevndini.

3. 102-43-2026: Kostnaðarmeting – spæliplássið á Heyggi.

Arbeiðsformaðurin hevur gjørt 2 kostnaðarmetingar av spæliplássinum á Heyggi:

Uppskot 1	kr. 782.928,72 u/MVG
Uppskot 2	kr. 1.098.712,04 u/MVG

Trivnaðarnevndin 20.08.2026:

Nevndin mælir til, at spæliplássið verður gjørt skjótast og tískil fær arbeiðsformaðurin heimild til at bíleggja tað, sum skal brúkast. Upphæddin liggur um 1 miljón krónur.

Tekniska nevnd 18.08.2026:

Nevndin mælir til uppskot nr. 1, har vit ikki hava karrusell og 3 rundar trampolinir, men umvæla gomlu trampolinina.

Fíggjarnevndin 20.08.2026:

Samtykt varð einmæl at mæla til at fáa arbeiðið gjørt sambært uppskoti nr. 1 – kr. 782.928,72. Harumframt varð mælt til at hava karrusell við – kostnaður umleið kr. 120.000,00 aftrat.

Avgerð:

Samtykt varð einmælt at fylgja tilmælunum hjá Trivnaðar- og Fíggjarnevndini.

4. 102-44-2026: Asfaltútboð 2026 – yvirlit yvir prísir.

Á fíggjarætlanini fyri 2026 vórðu kr. 150.000,00 settar av til vegir í Sandvík.

Tekniska nevnd 18.08.2026:

Mælt verður til at asfaltera Garðagøtu – øki 1 og 12 fermetrar av Nýggjavegi.

Vega- og havnanevndin 20.08.2026:

Nevndin mælir til, at asfalterað verður sbr. asfaltútboði á nr. 1 Garðagøtu – øki 1, vídd 365 m2, nr. 5. Nýggjavegi 12,5 m2, nr. 6 Mýravegi 972 m2 og 4 m2. Haraftrat at játta kr. 40.000,00 til at fresa og gera holur aftur.

Fíggjarnevndin 20.08.2026:

Samtykt varð einmælt at mæla til at asfaltera Garðagøtu – øki 1 og 12 fermetrar av Nýggjavegi (samtykt á fundi tann 27.02.2025). Harumframt varð mælt til at asfaltera Mýraveg (nr.6) umleið kr. 300.000,00 og umvæling av holum ymsastaðni umleið kr. 40.000,00. Samlaði kostnaðurin av asfalti verður sostatt umleið kr. 500.000,00 og verður tí neyðugt við eykajáttan umleið kr. 350.000,00 til vegir.

Avgerð:

Einmælt samtykt at fylgja tilmælunum hjá Vega/havnanevndini og Fíggjarnevndini.

5. 102-50-2026: Innkomin tilboð uppá arbeiðsbil.

Innkomnu tilboðini eru:

Wenzel – Ford Transit Custon	kr. 367.200,00 u/MVG
Bilasølan – VW Transporter	kr. 410.000,00 u/MVG

Tekniska nevnd 18.08.2026:

Mælt verður til at keypa arbeiðsbilin næsta ár.

Vega- og havnanevndin 20.08.2026:

Nevndin mælir til at keypa arbeiðsbilin komandi ár.

Fíggjarnevndin 20.08.2026:

Samtykt varð einmælt at mæla til at útseta keyp av arbeiðsbili til komandi ár.

Avgerð:

Einmælt samtykt at fylgja tilmælunum hjá nevndunum.

6. 102-51-2026: Dagstovnurin Brosið – millumbygningur.

Støðutakan viðvíkjandi arbeiðinum at gera millumbygning á dagstovninum.

Tekniska nevnd 18.08.2026:

Mælt verður til, at handverkarar verða tiknir inn til at gera arbeiðið.

Trivnaðarnevdnin 20.08.2026:

Nevndin er einmælt samd um, at arbeiðsformaðurin biður handverkarar gera millumbygningin.

Fíggjarnevndin 20.08.2026:

Samtykt varð einmælt at mæla til, at arbeiðið verður gjørt av uttanhýsis handverkarum.

Avgerð:

Einmælt samtykt at fáa arbeiðið gjørt innanfyri verandi fíggjarætlan kr. 280.000,00, ið umfatar millumbygning og skúr og at arbeiðið verður gjørt av uttanhýsis handverkarum.

7. Ikki almenn mál.

Fundarbókin lisin og skrivað undir. Fundur lokin kl. 18.00

Poul Laust Christiansen	Rakul Mørk	Jóhannes Liasson Rasmussen
Thorstein Thomsen	Jónfinn L. Poulsen	Eir J. Norðberg